## DAGSINS MEINING

# Vaktarskifti á mentanarborgini

Einki stendur í stað. Alt broytist. Og so er eisini á mentanarháborgini í Føroyum, Norðurlandahúsinum. Maður kemur í mans stað verður tikið til. Hesaferð er tað maður, sum er komin í kvinnustað, nevniliga stjóraskiftið í Norðurlandahúsinum. Nú um dagarnar var vaktarskifti, og danin Niels Halm tók við stjórasessinum eftir íslendsku Helgu Hjørvar. Helga hevur verið sera virkin og hevur verið við til at geva Norðurlandahúsinum lív og innihald. Nú tekur so Niels við og hevur sagt seg seg vilja halda fram í tí anda, sum Helga og onnur undan henni hava skapt í húsinum. Vit ynskja Niels Halm enn einaferð vælkomnan og góða eydnu. Og vit ynskja Helgu Hjørvar alt tað besta, nú hon fer aftur til Íslands. Vón okkara skal vera, at hon kann vera við til at byggja brýr millum íslendska og føroyska mentan. Tá hugsað verður um, hvusus nógv gott í beinið føroysk mentarnarfólk hava fingið í Íslandi, her ikki minst okkara alra Eivør, so skuldi verið nokk at trivið í hjá einum fyrrverandi stjóra í Norðurlandahúsinum.

Hin broytingin á mentanarháborgini er formansskiftið í stýrinum. Danin Helvin Høst er avloystur av svianum Lars Hjaltén. Vit takka Helvin fyri hesi fýra árini og ynskja Lars vælkomnan. Nýggi stýrisformaðurin vónar, at hann kann geva sítt ískoyti til, at føroysk mentan verður kend uttanfyri Føroyar. Tí kunnu vit taka fult undir við. Tí umframt at vera við til at menna føroyska mentan, at fáa útlendska mentan hendavegin, so er tað uppgávan hjá Norðurlandahúsinum at medvirka til, at føroysk mentan kemur út um landoddarnar. Ein kann siga, at felags fyri alt virksemið hjá stovninum er at skapa synergi tvs. at gera virksemið so miðvíst og fjølbroytt, at tað kann seta ringar í vatnið her og har.

Føroyingar eru góðir við Norðurlandahúsið. Tað vil tó altíð vera torført at gera øllum tilvildar. Tá hugsað verður um, hvussu nógv mentanarligt virksemi er í hesum landi, og hvussu nógv kemur uttanífrá, so er greitt, at talan vil vera um raðfesting. Slík raðfesting er eisini tengd at teimum persónum, ið standa á odda, hvat hesir hava tikist við, tí umhvørvi teir koma frá og so spildurnýggja umhvørvið í Norðurlandahúsinum.

Nú vita vit ikki, hvussu nýggja leiðslan fer at raðfesta annað enn at hildið verður fram sum higartil umframt at nýggju fólkini koma at seta síni fingramerki á. Tað er greitt, at skal optimalt fáast burtur úr, so mugu aðrir stovnar, fyritøkur, tað almenna og eisini fjølmiðlarnir spæla við og stuðla undir tey góðu mentanarligu tiltøkini. Okkara partur skal so ikki leggja eftir og fara vit sum komandi fjølmiðlahús í Vágsbotni at gera okkara til, at mentanarliga virksemi bæði í Norðurlandahúsinum og restini av landium fær ta umrøðu, sum tað hevur uppiborið. Mentanin er ein av týdningarmestu súlunum í einum tjóðarbygnaði og her ræður um, at allar góðar kreftir virka saman. Eisini fjølmiðlarnir. Tað er tó ein sannroynd, at luturin hjá fjølmiðlunum at stuðla undir føroyskari mentan liggur ikki eftir, tó at hetta verður gjørt eftir førimuni og við tí avmarkaðu fíggjarligu orku, sum er tøk. Her fara vit so eisini at bjóða okkum fram og geva okkara íkast, eftir førimuni sjálvsagt, tá nýggja fjølmiðla- og mentanarhúsið í Tórsgøtu 1 í Havn verður tikið í nýtslu, og Sosialurin verður granni hjá fleiri týðandi mentanarstovnum, Tjóðpallinum, Margarinfabrikkini, Grímu, Undirhúsinum fyri ikki at tala um løgtingi og landsstýri, sum skulu skapa karmarnar rundan um eitt gott, sunt og virkið mentanarlív. Livst so spyrst.

**Sosialurin**

## VIÐMERKINGAR

# Niðurstøður eftir valið

**Rói Egholm**



Fólkatingsvalið í Føroyum hin 8. februar í ár endaði við, at tann stóri vinnarin gjørdist Tjóðveldisflokkurin og næstur honum kom Fólkaflokkurin.

Tjóðveldisveljarin staðfesti so ruddiliga, at formaðurin í Tjóðveldisflokkinum eitur Høgni Hoydal.

Hinvegin staðfesti Tjóðveldisveljarin eisini, at Tórbjørn Jacobsen hoyrir heima í Tjóðveldisflokkinum. Hann eins og Høgni fingu eitt framúr gott val.

Tjóðveldisveljarin hevur nú krav uppá, at Høgni og Tórbjørn finna út av at jarða gamalt agg og at floksarbeiðið aftur fer at myndast av tí, sum vit arbeiða so hart fram ímóti, nevniliga einum sjálvberandi búskapi og harvið fullum føroyskum valdi í Føroyum.

Formaðurin í Fólkaflokkinum, Anfinn Kallsberg fekk dygga undirtøku og harvið eina álitisváttan frá føroyska veljaranum, at hann er verdigur til eitt og hvørt politiskt arbeiði.

Spenningur er nú um, hvussu Anfinn fer at arbeiða á Fólkatingi.

Tá fullveldissamgongan fór til verka í 1998, stóð táverandi løgmaður Anfinn Kallsberg á odda í teirri samgonguni, sum fyri nógvar føroyingar birti ta vón, at nú fóru føroyingar at taka fulla ábyrgd av Føroyum. Einum Føroyum, sum við støði í føroyska fólkinum og tørvi okkara fór at menna seg til eitt nútímans samfelag og harvið fór at samarbeiða sum javnbjóðis partur við øll onnur heimsins lond.

Tíverri lagaði tað seg so, at sambandsvongurin í Fólkaflokkinum kláraði at máa fullveldisstøði undan Anfinni, og eftir stutta tíð høvdu hesar afturhaldskreftir mest sum bundið hann niður, soleiðis at hann bert varð eitt hím av sær sjálvum tey seinastu árini, hann sat sum løgmaður.

Tað, sum hendi á valinum hin 8. februar, var, at afturhaldsvongurin í Føroyum ikki fekk ta undirtøku, sum hann hevði roknað við. Hvørgin av stóru afturhaldsflokkunum, Sambandsflokkurin og Javnaðarflokkurin, fingu nøktandi undirtøku, og sambandsvongurin í Fólkaflokkinum fekk eisini minkandi undirtøku.

Anfinn Kallsberg fekk frá veljarum sínum eina ábending um, at tíðin nú er komin til at taka fullveldisarbeiðið uppaftur, og at tíðin eisini er komin, at hann tekur uppgávuna upp á seg aftur at leiða Fólkaflokkin fram ímóti sínum endaliga máli, nevniliga einum frælsum Føroyum.

Anfinn Kallsberg nevndi undir valdystinum, at í politikki, vildi Høgni Hoydal ikki vita av sær. Um tað er rætt, so hava Høgni Hoydal og Annfinn Kallsberg eisini her eina uppgávu at loysa, nevniliga at tosa saman og saman arbeiða fram ímóti aftur at fáa virðingina fyri føroyska fullveldinum at blóma.

Teir báðir smærru flokkarnir, Sjálvstýrisflokkurin og Miðflokkurin, greiddu veljarunum frá, at teir eisini hava einar frælsar Føroyar sum mál. Hesir flokkarnir høvdu eisini framgongd.

Við verandi sambands ABC-samgonguni eru føroyingar aftur í teirri støðu, at øll gráta um neyð og elendigheit, júka um at einki ber til og um at veita stuðul til vinnuna fyri at hon skal yvirliva o.s.fr. Tað sýnist sum um ein partur av Føroya fólki er í ferð við at seta seg niður aftur á dintilin í teirri vón, at onkur uttanífrá kemur at loysa trupulleikarnar fyri okkum.

Nei, latið okkum fáa vent teirri mentalu støðuni, soleiðis at vit, eins og undir fullveldistilgongdini frá 1998, aftur fara at trúgva uppá og ásanna, at tað bert eru føroyingar, sum kunnu loysa føroysku trupulleikarnar, tað eru bert føroyingar sum kunnu menna føroysku tjóðina, at vit klára okkum í kapping við alt og øll, eisini kinverjar, og at vit eiga eina bjarta framtíð um bara vit standa saman øksl við øksl.

Eg trúgvi uppá, at tað býr ein tráan um sjálvbjargni í hjartanum á hvørjum einasta føroyingi, sama hvør politiski liturin er. Tað fær eina savnandi ávirkan á okkara fólk, um vit føroyingar seta okkum tað felags mál miðvíst at arbeiða fram ímóti, at Føroyar gerast sjálvbjargnar, og at vit ikki samtykkja lógir, sum beinleiðis arbeiða ímóti sjálvbjargnismálinum, sum eitt nú at samtykkja eina lóg um víðkaðar heimildir á uttanríkispoltiska økinum, sum byggir á "Det Danske Riges Grundlov"

Hetta er ikki ein roynd at siga, at eg havi rætt og onnur hava órætt. Hetta er ein roynd at vísa á nakrar niðurstøður, soleiðis sum eg tulki úrslitið. Føroya fólk stendur ikki aftan fyri hugskotið um, at vit skulu hava loysing í morgin. Men eg vóni, at vit kunnu semjast um, at sjálvbjargni er eitt høvuðsmál, og at tað eigur at røkkast saman við teimum politikarum, sum eru virknir nú.

Eg vil hervið nýta høvi at takka føroyska veljaranum fyri, at vit so manniliga stóðu saman til hetta valið og vístu á, at politiska arbeiðið aftur skal snúgva seg um sjálvbjargni.

**Innsent tilfar**

Av tí at vit fáa rættuliga nógv innsent tilfar sendandi – meira enn vit fáa í blaðið – hevur blaðleiðslan verið noydd at gjørt nakrar avmarkingar.

Enn sum áður skal fult navn skal vera undir øllum innsendum greinum – annars verða tær ikki prentaðar. Harnæst tilskila vit okkum rætt til at ikki at taka við tilfar, sum eisini er sent øðrum bløðum ella hevur verið prentað aðrastaðni.

Drúgvar greinar – greinar sum eru longri enn áleið 5.500 tekn, verða raðfestar lægri, og koma bert í blaðið, um pláss er fyri teimum. Tað er ein fyrimunur um vit fáa tilfarið umvegis teldupost ella á diskli.

Sosialurin

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo
**Fíggjarleiðari:** Tóki Højgaard toki@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo
Teresa Jensen teresa@sosialurin.fo
Hjørdis Gregersen hjordis@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Edvard Joensen edvard@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Snorri Brend snorri@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo
Terji Nielsen terji@sosialurin.fo
Anna V. Ellingsgaard anna@sosialurin.fo
Eydna Skaale eydna@sosialurin.fo
**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo
Terji Nielsen terji@sosialurin.fo
**Myndamenn:**
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Postsmoga 231
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo
**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 228814
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo
**Sosialurin í Vágum:**
360 Sandavágur
tel. 333820, 220507 fax 333720
e-post: edvard@sosialurin.fo
e-post: vagar@sosialurin.fo

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Føroyaprent
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin
**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Argjavegur 26,
Tel. 341800, Fax 341801
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan $14^{00}$

**Lýsingar**

| **Freistir:** | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Týsdagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Leygardagsblaðið | Frí. kl. 10 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Stødd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39mm og rúmið millum teigarnar er 4mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.